# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*–Vit mugu viðganga, at ta einu løtuna hugsaði eg, at hetta kundi ikki vera rætt*

*løgreglutalsmaður í Keypmannahavn*

# Vænta ófriðarligt vikuskifti Í Keypmannahavn



**Higartil hevur løgreglan í Keypmannahavn tikið 219 fólk í sambandi við ófriðin á Nørrebro og aðrastaðni í býnum.**

Tey, sum skipaðu fyri ófriðinum í Keypmannahavn í gjár, ætla sær ikki at gevast so, og tí væntar løgreglan mótmælistiltøk alt vikuskiftið.

– Støðan er so spent, at eg vænti, at alt fer at enda í ruðuleika aftur. Eg vænti, at vit fara at síggja fleiri tiltøk afturat, sigur Janne Toft-Lind, sum stendur á odda fyri einum stuðsbólki, ið royndi at hjálpa teimum ungu at verða verandi í Ungdomshuset á Jagtvej á Nørrebro.

Í gjárkvøldið breiddi ófriðurin seg til Christianshavn og Christiania. Ungfólk settu eld á bilar og tveittu brandbumbur eftir løgregluni, men tað eydnaðist tí væl mannaða løgregluliðinum at fáa tamarhald á støðuni.

Á Nørrebro vóru fleiri hundrað ungfólk í bardaga við løgregluna. Tey ungu savnaðu burturkast og annað í gøtunum og settu eld á. Men løgreglan var fyrireikað og ruddaði gøturnar við serútgjørdum akførum.

Um trýtíðina hevði løgreglan fingið tamarhald á støðuni, og í morgun var friðarligt á Nørrebro. Tá hevði løgreglan tikið 219 fólk. Tað vísti seg, at nógvir útlendingar høvdu verið uppi í ófriðinum, tí millum tey handtiknu vóru sviar, norðmenn, týskarar, amerikanarar, póllendingar og nøkur úr øðrum londum. Trý fólk fingu skaða í ófriðinum. Tvey teirra eru løgreglufólk.

Fleiri hava undrast á, at løgreglan valdi at rudda Ungdomshuset upp undir eitt vikuskifti, og løgreglan væntar eisini, at ófriðurin fer at kykna aftur í kvøld. Talsmaðurin hjá løgregluni, Flemming Steen Munch, segði í gjárkvøldið, at løgreglan fer at brúka sama framferðarhátt sum í gjár og í gjárkvøldið.

Í gjár sendi løgreglan í Keypmannahavn boð eftir hjálp úr øðrum pørtum av landinum, og hon fær aftur hjálp í dag. Hinvegin er eisini vandi fyri, at mótmælisfólkini fáa hjálp um vikuskiftið.

# Afrika vorðið farleið fyri rúsaevnasmugling

**Næstan alt opium, sum er á heimsmarknaðinumm, er úr Afghanistan.**



Smuglarafelagsskapir, sum smugla rúsevni úr Suðuramerika og Asia til Evropa og Norðuramerika hava funnið eina nýggja flutningsleið, skrivar ST í einari nýggjari frágreiðing.

Í dag fer ein stórur partur av rúsevninum umvegis ymisk lond í Afrika. Orsøkin er sambært ST, at nógv afrikonsk lond hava ikki umstøður til at tryggja, at landsins ella altjóða lógir og reglur verða hildnar, og hesum gera rúsevnasmuglararnir sær dælt av.

ST-stovnurin ímóti rúsevnasmugling, INCB, skrivar í frágreiðingini, at stovnurin stórur fyri tí veksandi handlinum við kokaini í evropeiskum londum og serstakliga í Bretlandi og Spania. Harafturat veksur handilin við kokaini eisini skjótt í teimum múgvandi pørtunum av India og í Hongkong.

Um rúsevnaframleiðsluna skrivar INCB, at næstan alt opium í heiminum kemur úr Afghanistan. Í fjør dyrkaðu teir afghonsku bøndurnir 6.100 tons av opium, og tað var næstan 50 prosent meiri enn í 2005, sigur INCB og leggur afturat, at í dag stavar ein triðingur av afghanska búskapinum frá rúsevnaframleiðslu.

## STUTT SAGT

### Funnu bumbuvirkir

Teir seinastu dagarnar hevur ísraelski herurin leitað eftir vápnum og bumbuverksmiðjum í palestinska býnum Nablus, og í gjár segði herleiðslan, at hermenninir høvdu funnið tríggjar bumbuverksmiðjur, sum hermenninir høvdu lagt í oyði. Átakið í Nablus er taðstørstahernaðarátakið á Vestara Áarbakka síðani í juli í fjør. Ísraelski herurin vil vera við, at nógvir av bumbumonnunum, sum hava gjørt um seg í Ísrael tey seinastu árini, komu úr Nablus, og at tað tí bvar neyðugt við átakinum. Palestinskir embætismenn siga harafturímóti, at átakið er ein roynhd at forkoma samstarvinum millum Fatah og Hamas, sum herfyri samdust um at skipa felags stjórn.

### Viðførið hvarv

Tann 17. desember kom eitt norsk ferðalag aftur til Noregs eftir at hava verið á rundferð í Avstralia, Kina og Singapore, men trupulleikin er, at viðførið hjá tveimum teirra er ikki komið til Noregs enn. Per Dolmseth, sum bíðar eftir sínum kufferti, sigur seg hava fingið at vita, at síðani hann kom til Noregs, hevur hansara kuffert verið í Avstralia, Singapore, Fraklandi, Italia og í Sveis. Norska ferðalagið ferðaðist við bretska flogfelagnum British Airways, men flogfelagið hevur biðið eitt italskt felag finna tey horvnu kuffertini. Kanska eru tey á veg nú. Í gjár frætti Per Dolmseth, at hansara kuffert stóð í Milano í Italia.

### Sex við næmingum

Ein 23 ára gomul lærarinna í amerikanska statinum South Carolina er sett í varðhald, eftir at tað er komið fram, at hon hevur havt kynsligt samband við fleiri dreingir í skúlanum. Sambært AP er talan um minst fimm dreingir í aldrinum 14 og 15 ár, sum hava havt kynsligt samband við lærarinnuna síðani í desember í fjør. Nú er Allema Williams Ward skuldsett fyri at hava havt kynsligt samband við ov ungar dreingir, og harafturat hevur hon mist sítt arbeiði.